Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*3. januar 2019*

# UMMÆLISSKRIV

## *viðvíkjandi*

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)**
(Leingjan av rættinum til barsilspening)

Fyrst er at siga, at BLF gleðist um, at samgongan leggur upp til at leingja rættin til barsilspening eftir barnsburð við 2 vikum, úr 46 vikum upp í 48 vikur. Síðani sitandi samgonga tók við, tann 15. september 2015, er tíðarskeiðið har ein kann fáa barsilspening eftir barnsburð longt úr 38 vikum upp í 48 vikur, og er hetta sera gleðiligt. (Tá er hetta uppskotið íroknað).

Tá sitandi samgonga tók við vóru 4 vikur markaðar til pápan. Pápin kundi tá lata 2 vikur av teimum markaðu til mammuna. Hetta broytti sitandi samgonga, við løgtingsmáli nr. 14/2015, soleiðis, at pápin ikki longur kundi geva av sínum markaðum vikum. Og hesum tók BLF fult undir við. Tá/um hetta uppskot verður samtykt, so hevur pápin 5 vikur íalt, sum eru markaðar til hann. Men hetta er ikki serliga nógv, tá hugsað verður um, at 14 vikur eru markaðar til mammuna. Og tá hugsað verður um, at av teimum 10 vikunum, sum eru komnar eyka undir hesari samgonguni, er bert 1 vika blivin markað til pápan.

Samgongan skrivar sjálv á síðu 6 í samgonguskjalinum[1] at:

**“Javnstøða**

Samgongan vil styrkja javnstøðupolitikkin, herundir javnstøðulógina. Gransking og hagtøl um arbeiðsmarknað og løn verða raðfest, eins og bæði kyn skulu eggjast til at nema sær útbúgving. Lóg um sonevnda “stalking” verður løgd fyri tingið, og ásetingarnar í revsilógini um neyðtøku verða dagførdar.

*Børn hava rætt til bæði foreldrini, og samgongan vil virka fyri at styrkja hesi rættindi.”*

[1] https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/6803/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf.pdf

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

Serliga hesin síðsti setningurin – Børn hava rætt til bæði foreldrini, og samgongan vil virka fyri at styrkja hesi rættindi – metir BLF, at hetta uppskotið eigur at taka nógv størri hædd fyri.

BLF vil her loyva sær at endurgeva úr teimum frálíku almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið, sum á síðu 3 skriva:

*"Samgongan vil, at javnstøðupolitikkur skal raðfestast høgt og hevur sett sær fyri at styrkja javnstøðu millum kynini.*[2] *Sambært átaki 17 í virkisætlanini, Javnstøðupolitikkur – tí tað loysir seg, hjá Almannamálaráðnum eigur Barsilsskipanin í størri mun at eggja pápum at taka barsilsfarloyvi. Tí verður onnur vikan, sum nú verður løgd aftur at rættinum til barsilspening, oyramerkt til pápan. Kanningar úr okkara grannalondum vísa, at tey londini, sum marka ávísar vikur til pápar, hava best úrslit í mun til, at pápar fara í barsilsfarloyvi. Samanborið við páparnar í grannalondunum eru føroysku páparnir teir, ið taka minst lut í rættinum til barsilsfarloyvi. Í Danmark taka páparnir 10% av barsilsfarloyvinum, í Finnlandi 11%, í Norra 21%, í Svøríki 27% og í Íslandi 30%.*[3] *Føroysku páparnir taka 8% av barsilsfarloyvinum.*[4]

*Nógvir ágóðar eru, við at pápar taka størri lut í barsilsfarloyvinum. Kanningar vísa t.d., at: lønargjógvin millum kynini minkar; øll familjan trívist betri; páparnir fáa eitt tættari samband við barnið, og hetta hevur stóran týdning í mun til kensluligu og andligu menningina hjá barninum, m.a. mótvirkar tað vánaligari sálarheilsu hjá børnunum og hevur jaliga ávirkan á teirra sjálvvirði; umsorganin hjá monnunum fremur størri javnstøðu, tí at børn, sum síggja pápar sínar taka lut í dagligu umsorganini, hava minni lyndi at halda seg til siðbundnu kynsmynstrini; gentur velja í minni mun siðbundin størv, og dreingir, tá ið teir verða menn, hava størri sannlíkindi at gera húsligt arbeiði.*[5] *"*

---

At enda vil BLF eisini vísa á útvarpskjakið[6] um pápakvotur í barsilsskipanini, millum forfólkið í Javnstøðunevndini, Ólavur Ellefsen, og landsstýrismannin sum varðar av arbeiðsmarknaðarmálum, Heðin Mortensen, har Ólavur Ellefsen staðiliga mælir til, at javnstøða verður víst í verki á barsilsøkinum, eisini í fyriliggjandi lógaruppskoti.

[2] https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/6803/fylgiskjal-mal-at-fremja-kvf.pdf
[3] Norðurlendska Ráðharraráðið, *Nordisk Statestik 2017*
[4] Upplýst frá Barsilsskipanini.
[5] Almannamálaráðið, *Javnstøðupolitikkur – tí tað loysir seg, Virkisætlan*, várið 2918, s. 28 f.
[6] http://kvf.fo/gmf?sid=89031

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

BLF vil tí staðiliga mæla til, at báðar vikurnar í hesum uppskoti verða markaðar til pápan.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**